# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Europapolitikkur fyri atfinningum

Europapolitikkurin hjá landsstýrinumer aftur fyri hørðum atfinningum frá fyrrverandi løgmann, Edmund Joensen. Hann hevur áður sóknast eftir innihaldinum í tí nýggja europapolitikki, sum varð fráboðaður, tá samgongan tók við. Tá nýggja landsstýrið varð skipað, var fráboðað, at nýggj kós var sett mótvegis Europa og Europasamveldinum. Kannast skuldi, um limaskapur í EFTA var eitt mál. Vit skuldu nærkast ES samveldinum og royna at fáa lut í teimum fýra frælsunum innan fyri ES: fríur flutningur av vørum, tænastum, arbeiðsmegi og kapitali.

Edmund finnst at, at síðani hevur lítið og einki verið røtt um tann nýggja Europapolitikkin. Hann finst eisini at fjølmiðlunum, tí miðlarnir einki gera við hetta mál. Henda atfinning er ikki heilt rættvís, tí vit hava her í oddagreinum eftirlýst einum miðvísum europapolitikki við greiðum innihaldi. Vit hava víst á, at síðan løgmaður undir fyrru samgongu kom aftur úr Bruxelles við einum lyfti um, at Føroyar kundu koma upp í granskingarprogrammið, ið myndar karmarnar fyri øllum granskingarsamstarvinum í ES, er í roynd og veru einki hent. Vit mugu geva Edmundi rætt í, at røða løgmans á ólavsøku var ikki upplagt høvi at koma við eini fráboðan um nýggja ES politikkin, men her varð lítið nevnt ud hetta týðandi mál. Í løgmansrøðuni verður bara stutt sagt, samstarvið við ES verður endurskoðað.

Uttan at leggja okkum út í føroyskan flokspolitikk mugu vit ásanna, at nakað er um hesar vera atfinningar. Undanfarna samgonga, royndi veruliga at fá gongd á uttanríkispolitikkin, men var fyri hørðum atfinningum frá nøkrum af teimum, sum nú sita við stjórnarábyrgd. Tann samgongan hevði hóast alt nøkur mál fyri ES samstarvinum innan útbúgving, gransking, flogferðslu o.a. og hesi mál vórðu eitt nú sett út í kortið við Visjón 2015. Verður sæð burtur frá málinum um gransking kom ikki tað stóra burturúr. Hinvegin hevði tann samgongan toluliga klár mál og hildu hóast alt pottinum javnan á kóki. Nú tykist hetta mál mestsum deytt, og tað er ikki gott fyri øll tey samfelagsøki, ið hava ein greiðan áhuga í einum meira formaliseraðum ES samstarvi.

Tað er sjálvsagt gott, at landsstýrið, ið jú tykist at halda fram, ætlar at endurskoða samstarvið við ES. Men almenningurin má fáa at vita við hvørjum atlitum endurskoðanin verður framd. Vit mugu við øðrum orðum fáa at vita, hvørji eru málini við europapolitikkinum, og hvussu hugsar landsstýrið sær at røkka hesum málum? Vit mugu kenna innihaldið í europapolitikkinum. Her trýtur opinleiki og trótandi opinleiki sømir seg ikki fólkaræði. Tað er tí neyðugt, at almenningurin verður kunnaður um politikkin á hesum øki, soleiðis at vit kunnu fáa tað neyðuga politiska og breiða samfelagsorðaskiftið um hetta stóra og týðandi mál.

**Sosialurin**

## Alt hevur tíð sína harra Løgmaður

SÓLVIT NOLSØ

**Frægast hevði verði fyri løgmann sjálvan, um hann valdi at leggja frá sær og lata onkran annan sleppa framat. Eg haldi, at hann eftirhondini hevur víst meir enn einaferð, at hann ikki hevur skil á samgongulimunum**

Løgmaður Jóannes Eidesgaard er ein kroystur maður í hesum døgum. Hann arbeiður uppá lívið við at finna eina loysn uppá trupulleikunum, ið komu í kjalarvørrinum av Gerhardsa verbalu álopum, ið settu løgmann lágt meðan Gerhard kom uppá hægsta tilbiðanarstatus á Sandoynni. Um Gerhard hevur hjálpt síni egnu søk ella ikki skal her verða ósvara, tí tey flestu vita nokk hvørjar fylgur hetta fer at fáa fyri Sandoyartunnilina. Fyri at koma aftur til løgmann, so situr hann (løgmaður) sum leiðari fyri eini minnilutastjórn, sum ikki fær arbeiðsfrið. Hvørki frá sínum egnu ella frá andstøðutinglimunum. Til tað eru brotini einfalt ov stór. Fyri at koma aftur til Gerhard, so hava Eidesgaard & Hoydal sætt hann sum ein trupulleika líka síðan samgongan legði frá landi. Gerhard hevur sett seg á eitt mál og hevur læst seg har. So hevur hann kravt sítt mál loyst fyrst og so kann restin loysast aftaná. Nógv hevur verið togast aftur og fram, men ongantíð hevur rikist fyri eini loysn. Ikki fyrrenn tunnilsnevndin bleiv sett. Tá byrjaði mann at síggja ljós í endanum á tunnellini, tí nú bleiv ein nevnd sett niðu BARA at viðgera tunnelir. So mátti alt fara at laga seg, men gakk. Páll segði ja, men Gerhard segði NEI. Tvinnir vórðu kostirnir hjá løgmanni aftaná tilmæli frá tunnilsnevndini og hvørgin vórðu mjúkir. Annahvørt skuldi løgmaður lova Gerhardi ein tunnil, ið byrjast skuldi uppá í 2009 ella stakk Gerhard í sekkin og rýmdi í land frá samgonguskútini. Endin gjørdist tað seinna og eftir situr løgmaður í eini minnilutastjórn, har eingin er sinnaður at taka upp samstarv við samgonguna, tí eingin flokkur uttanfyri samgonguna vil eyðkennast við klandursskútuna CHE.

Hetta er tó langt frá einasti trupulleiki hjá løgmanni, umenn hetta mál hevur fingið mesta umrøðu. Landssjúkrahúsið var ein stórur knútur, ið leingi lá óloystur. Úrslitið bleiv eitt opið kríggj millum Hans Paula Strøm og Jenis av Rana. Orðakríggi millum teir báðar suðringarnar var ikki hissini og okkurt lýsingarorð var betur ósagt.

Ein annar trupulleiki hevur stungið seg upp nú, sum eisini er tengdur at Sandoyartunnellini, men tann trupulleikin hevur einki við Gerhard Lognberg at gera. Bergtóra H. Joensen og Páll á Reynatúgvu er rúkandi ósamd um Sandoyartunnellina og um hon skal gerast ella ikki.

Torbjørn Jacobsen fær eisini dyggar ákoyringar frá nøkrum av sínum starvsfeløgum, so sum Heina O. Heinesen og Gerhard Lognberg, sjálv um tað er ivasamt um hann er inni ella úti. Kanska Eyðgunn Samuelsen í sínum aftursvarið til Gerhard kann fortelja okkum um Gerhard er inni ella úti. Og um ósemjurnar ikki vórðu nokk av, so er Mikkjal Sørensen ikki glaður fyri ætlaðu skerjingarnar í blokkinum. 117 milliónir er ov nógv at spæla sær av við, heldur Mikkjal Sørensen og líka leggur hann í, um tað er partur av sangonguskjalinum um ætlanin er at minka blokkin.

So um vit hyggja samanumtikið at tíðarskeiðinum, sum samgongan hevur sitið, so koma vit ikki at minnast aftur á førdan politikk. Vit minnast aftur á ósemjur. Sjálvt tá teir hava roynt at ført politikk er ætlanin kollrend. Fiskidagamálið, útlendingamálið, blokkniðurskurður og tunnellir eru nøkur av málunum, sum samgongan hevur roynt at ført fram, men ongantíð hevur full semja verði um nakað. Eg ivist í um nakar samgongu limur las samgonguskjalið áðrenn samgongan bleiv skipa tí eingin er so óður inná skjalið, sum júst samgongan.

So Jóannes Eidesgaard, legg kongin og lat onkran annan sleppa framat, tí tín leiklutur er spældur. Vit sum standa uttanfyri minnast ósemjur og stuttlig orðaskiftir og tað var valla meiningin hjá Hoydal & Eidesgaard at verða útsettir sum ein stuttlig og rokmikil samgonga tá teir byrjaðu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.